## VIÐMERKINGAR

# Skerjingin av blokkinum hevur skatt føroysk áhugamál

**Kári Petersen**



***Um blokkniðurskurðurin ikki varð framdur, og tær 364 mió. kr. í staðin fyri vórðu nýttar til eykaavdrátt uppá landskassaskuldina, hevði skuldin verið afturgoldin tíðliga í 2008. Við at skerja blokkin og halda fram við verandi avtalu, verður skuldin ikki afturgoldin fyrr enn í 2018. Landsstýrið vil heldur, at føroyski skattgjaldarin skal stríðast við hesa skuld fram til 2018, heldur enn at nýta tær 364 mió. kr. av blokkstuðulinum til at gjalda skuld. Landsstýrið hevur sostatt við sínum dugnaloysi økt skattabyrðuna hjá vanliga føroyinginum.***

**Landsstýrið heldur Føroyar fast í skuldarbyrðu.**
Landsstýrið sigur seg vilja gera Føroyar politiskt og fíggjarliga óheftar. Ein tann mest lemjandi fíggjarliga bindingin av Føroyum er at vit skylda 3,6 mia. kr. til danska ríkiskassan. Føroyar høvdu sostatt havt eina stóra fíggjarliga binding minni, um vit høvdu afturgoldið skuldina til fulnar í 2008. Við ikki at nýta møguleikan at nýta blokkin at gjalda skuld við, hevur landsstýrið bundið Føroyar fíggjarliga til Danmarkar fram til 2018. Við at minka um tær inntøkurnar, sum kundu verið nýttar til at loysa Føroyar úr skuldarhaftinum, hevur landsstýrið gjørt Føroyar munandi meira skuldarbundnar enn tær vóru frammanundan.







### Landskassaskuld við og uttan blokkniðurskurð.

**Verandi lánsavtala**
**(har blokkurin er skerdur við 364 mió. kr.)**

| (mió. kr.) Ár | Restlán primo | Renta | Avdr. | **Restlán ultimo** |
|---|---|---|---|---|
| 1999 | 4000 | 200 | 123 | **3877** |
| 2000 | 3877 | 194 | 129 | **3748** |
| 2001 | 3748 | 187 | 136 | **3612** |
| 2002 | 3612 | 181 | 142 | **3470** |
| 2003 | 3470 | 173 | 150 | **3320** |
| 2004 | 3320 | 166 | 157 | **3163** |
| 2005 | 3163 | 158 | 165 | **2999** |
| 2006 | 2999 | 150 | 173 | **2825** |
| 2007 | 2825 | 141 | 182 | **2644** |
| 2008 | 2644 | 132 | 191 | **2453** |
| 2009 | 2453 | 123 | 200 | **2253** |
| 2010 | 2253 | 113 | 210 | **2042** |
| 2011 | 2042 | 102 | 221 | **1821** |
| 2012 | 1821 | 91 | 232 | **1589** |
| 2013 | 1589 | 79 | 244 | **1346** |
| 2014 | 1346 | 67 | 256 | **1090** |
| 2015 | 1090 | 55 | 268 | **822** |
| 2016 | 822 | 41 | 282 | **540** |
| 2017 | 540 | 27 | 296 | **244** |
| 2018 | 244 | 12 | 311 | **-67** |

**Lánsavtala, har blokkurin ikki er skerdur**
**(við 364 mió. kr. árligum eykaavdrátti)**

| (mió. kr.) Ár | Restlán primo | Renta | Avdr. | Eyka-avdr. | **Restlán ultimo** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1999 | 4000 | 200 | 123 | | **3877** |
| 2000 | 3877 | 194 | 129 | | **3748** |
| 2001 | 3748 | 187 | 136 | | **3612** |
| 2002 | 3612 | 181 | 142 | 364 | **3106** |
| 2003 | 3106 | 155 | 168 | 364 | **2574** |
| 2004 | 2574 | 129 | 194 | 364 | **2016** |
| 2005 | 2016 | 101 | 222 | 364 | **1430** |
| 2006 | 1430 | 71 | 252 | 364 | **814** |
| 2007 | 814 | 41 | 282 | 364 | **168** |
| 2008 | 168 | 8 | 315 | 364 | **-511** |

**Landsstýrið hevur økt skattabyrðuna hjá føroyingum.**
Landsstýrið førir fram, at tað hevur lækkað skattabyrðuna hjá føroyingum. Hetta er ikki rætt. Ein kann altíð minka skattainnkrevjingina í einum einstøkum ári ella í nøkur ár. Men í síðsta enda avhongur skattabyrðan ikki av, hvussu nógvan skatt ein skal gjalda í einum einstøkum ári, men av hvussu stórar tær samlaðu skyldurnar eru hjá landskassanum.

Við at minka blokkstuðulin, hevur landsstýrið minka um inntøkurnar hjá landskassanum, og hevur tí økt munandi um skattabyrðuna hjá vanliga føroyinginum, um ein hyggur bara eitt sindur inn í framtíðina.

**Hví hevur landsstýrið skert heildarveitingina ?**
Ein av orsøkunum til at landsstýrið hevur minkað blokkin, er fyri at tryggja sær, at tey sum koma til valdið aftaná valið (javnaðarflokkurin), ikki skula fara at nýta enn meir pening enn sitandi landsstýri. Landsstýrið hevur annars økt árligu nýtsluna við 950 mió. kr. í hesum valskeiðinum.

Men um landsstýrið heldur, at nýtslan hjá landskassanum ikki eigur at veksa, so átti landsstýrið at gjørt nýggja avtalu við danir um at gjalda ein eykaavdrátt uppá 364 mió. kr., og harvið gjalda skuldina skjótari aftur. Hetta kundu danir ikki sagt nei takk til. Hetta hevði somuleiðis lagt eitt loft yvir, hvussu nógv útreiðslurnar kundu vaksið.

Í sínum dugnaloysi hevur landsstýrið heldur valt eina loysn, har vit við skattaborgarans pengum skulu gjalda fyri 80árini líka inntil 2018.

**Hví skulu vit royna at minka um skuldina ?**
Tað er umráðandi, at Føroyar gerast skuldarfríar so skjótt, sum tað nú einaferð er gjørligt, m. a. tí talið av pensiónistum veksur við 30 prosentum fram til 2017, meðan talið av teimum, sum eru í arbeiðsførum aldri bert veksur 5 prosent. Føroyar skulu tí helst vera skuldarfríar og eiga pening til góðar, tá teir stóru eldraárgangirnir koma, so ráð verður til heimarøkt, eldrarøkt og sjúkrarøkt.

Javnaðarflokkurin hevur trinnar orsøkir til vera ímóti at lækka blokkstuðulin. Í fyrsta lagi ynskir javnaðarflokkurin at gera Føroyar fíggjarliga óheftar. Í øðrum lagi ynskir javnaðarflokkurin at fremja skipanir og loysnir, sum gera tað møguligt at varðveita vælferðartænasturnar, eisini tá teir stóru eldraárgangirnir koma. Í triðja lagi eru nakrar av vælferðartænastunum, serliga eldrarøktin, forsømd av sitandi landsstýri, so tað er rætt, at javnaðarflokkurin hevur eitt ynski um meirnýtslu á hesum økjum. Tað er tó vert at leggja merki til, at sjálvt um útreiðslurnar á hesum økjum fara at veksa 50 til 100 mió. kr. í komandi valskeiði, so hevði borið til at goldið ein eykaavdrátt uppá útvið 300 mió. kr. um árið, og harvið at afturgoldið alla landskassaskuld í ár 2010 um. Landsstýrið hevur tí við skerjingini av blokkinum álvarsliga skatt føroysk áhugamál.



## BRÚKARIN

# Fuktur í íbúðini

LUFTVÆTA
*Rigmor Dam*

Nógv fólk hava trupulleikar av fukti í húsunum ella íbúðini. Fukturin er besta umhvørvi hjá dustmáttum og blámusoppum at liva í. Men tað ber til at koma trupulleikunum til lívs.

### Máta luftvætuna
Til at máta luftvætuna í íbúðini ber til at brúka eitt hygrometur. Á vetri skal talið vera 40-45 % og á sumri 60-65 %. Orsøkin til at munur er á sumri og vetri kemst av, at heit luft inniheldur meira vætu enn køld luft.

### Tekin uppá trupulleikar við luftvætuni
Nógv tekin eru, tá luftvætan ikki er í lagið. Til dømis um nógv døgg er innanfyri á rútunum. Hýggjuskotin modnaroykur í íbúðini benda eisini á, at ov nógv væta er í luftini, umframt at hýggj á uttaru veggunum og jarðskotnir blettir á klæðunum eru tekin.

### Vánalig inniluft
Húsini nú á døgum eru ov 'væl' bjálvaði og eru sostatt 'ov tøtt'. Tey fáa ikki anda. Eisini gevur húsfólki nógva vætu frá sær. Ein familja við fýra fólkum gevur einar 15 litrar av vatni frá sær um samdøgri. Tey sveitta, anda, eru í bað, turka klæði og gera mat.

### Tá ið luftvætan er ov høg
Støvmáttur fáa betri gróðrar- og livilíkindi, tá ið luftvætan er ov høg. Blámusoppar trívast betur, og vánalig útlufting ger, at bústaðurin luktar hýggjuskotin.

### Hetta er at gera
Reinsið eymhettuna. Eisini filturið skal reinast av og á - lættast í uppvaskimaskinuni. Kolfilturið skal skiftast viðhvørt (les brúkaravegleiðingina).

Smáir elektriskir ventillatorar, sum kunnu sita í vindeygum og í veggjum, skulu dustsúgvast og vaskast av og á. Minnst til at sløkkja fyri streyminum áðrenn vaska verður við vatni. Ventilatorarnir gera eiheildur so nógvan gang, tá ið teir eru reinir.

Ikki turka klæði inni í íbúðini. Tað økir luftkuktigheitina nógv. Turka klæðini í einum svalligum kjallara ella uttandura - tá lukta klæðini eisini nógv frískari.

Øll rúm í húsinum skulu vera javnt hitaði - eisini sovikømur.

Lufta væl út 2-3 ferðir dagliga, í einar 5-10 minuttir í senn.

Innbúgv eigur ikki at standa upp ímóti uttaru veggunum.

*Kelda: Forbrugerinformation*

# Har vart tú lumpað. Ha!

Soleiðis kennist viðhvørt, tá ið ein nýkeyptur lutur ella tænasta við eitt verður ein marra. Skrøddu nylonsokkarnir á nýggja stovugólvinum tala fyri seg. Liturin á svørtu leðursofuni, sum knappliga situr á bakinum á systir. Handverkarin, sum ikki heldur seg til tilboðið, hann hevur givið uppá at tekja húsini - um hann er so frægur at møta upp, sum avtalað. Ella rómaísurin, har eingin rómi er í.

Í slíkum førum standa vit brúkarar eftir sum kánus og hava ongan tjans. Kunnu bara vóna at handilin ella útbjóðarin í reinum kappingaranda forbarmar seg og vísir okkum náði. Tí, í Føroyum hava vit ongan at venda okkum til í slíkum førum, hvørki til at ráðgeva í brúkaratrætum, ella til at upplýsa um brongluta marknaðin av vørum ella lógávuna á økinum.

Í øllum hinum norðanlondum eru brúkarastovnar, felagsskapir og umboðsmenn, sum hava til uppgávu at gera tað lættari at vera vanligur brúkari. Slíkir stovnar, sum eisini finnast í øllum londum í ES og USA, spæla ein sjálvsagdan leiklut á marknaðinum, og eru at meta sum viðspælarar, ikki mótspælarar, hjá vinnulívinum. Tí eingin hevur hug at bjóða okkurt, sum brúkarin ikki vil hava - tá verður bara ein tapari og eingin vinnari.

# Lívsvirðir á skránna



*Lívsvirðini hjá brekaðum verða sett á skránni til komandi økisfundirnar hjá Javna*

**Hvat kann geva lívsvirðið? Tað er spurningurin, sum verður settur á komandi økisfundum hjá Javna**

LÍVSVIRÐI
*Jákup Mørk*

Hóast tað kanska ljóðar sum ein náttúrligur partur av virkseminum hjá felagnum Javna, so hevur júst evnið um lívsvirðir ikki verið tað mest vanliga til fundirnar hjá felagnum.

Á komandi økisfundunum hevur felagið tó gjørt av, at evni, sum á onkran hátt kunnu lýsa lívsvirði hjá menningartarnaðum, verða tikin á skránna.

Í tíðindaskrivi boðar Javni frá, at komandi fundirnir verða í Klaksvík, á Skála og í Havn komandi mánadag. Enn er endaliga skráin fyri fundirnar ikki lýst, men talan verður um fyrilestrar av ymsum slag, sum lýsa lívsvirðini á ymsum økjum. Tað verið seg systkin, skúlin og politikkarar millum annað. Harumframt er so eisini ætlanin at kvøldið skal gerast til eitt slag av hugnakvøldi við felagssangi v.m.

Hóast tað enn er langt eftir á mál, so fegnast starvsnevndin hjá Javna í tíðindaskrivinum um, at framstig eru at hóma í teirra arbeiði. Víst verður millum annað á, at landsins myndugleikar nú hava viðtikið, at ein langtíðarætlan fyri bústaðarviðurskifti hjá brekaðum skal gerast, og á fíggjarlógini fyri inniverandi ár er peningur settur av til rakstur av nýggjum sambýlum. Eisini frøist nevndin um nýggja bústovnin og sambýlið, sum er tikið í nýtslu í Klaksvík.

Sum verða fundir í Havn, á Skála og í Klaksvík mánadagin komandi. Fundurin í Suðuroy verður eftir ætlan hildin leygardagin, 23. februar.